

# Olju-Noreg: Útlit til nógv virksemi, eisini næstu árini

**Jógvan Hugo Gardar**

11.11.2014 - 21:02

Oljan.fo

Virksemið í norsku oljuvinnuni er økt nógv seinnu árini. Orsøkirnar eru millum annað at oljuprísurin hevur verið góður, nýggir brunnar eru funnir og gomul útgerð er skift út við betri útgerð. Toppurin hjá norsku oljuvinnuni er í ár, men bæði íløgurnar og og virksemi á norska landgrunninum kemur framhaldandi at vera høgt í nógv tey næstu árini.

Seks ár aftaná at fíggjarkreppan rakti heimin er heimsbúskapurin framvegis ikki komin fyri seg aftur, eftirspurningurin eftir orku er lægri og oljuprísurin er á sínum lægsta støði farnu fýra árini.

Samstundis er kostnaðarstøðið økt munandi farnu tíggju árini á norska landgrunninum, eins og tað eisini hevur gjørt í øðrum pørtim av heinminum har olja verður framleidd.

Hesin økti kostnaðurin ger eisini at fleiri av teimum ætlanunum sum kundu verið troyttar, ikki verða tað, tí váðin er ov stórur at gera íløgur í hesar ætlaninar.

Norsk olje og gass hevur júst latið frá sær sína ársfrágreiðing, har tey hyggja eftir gongdini í oljuheiminum. Frágreiðingin kann takast niður á hesi leinkjuni "Tid for konsolidering"

Í frágreiðingini verður millum annað komið inn á at norska oljuvinnan er á einum vegamóti, og avgerðir mugu takast um hvat sum skal gerast, um ein ynskir at troyta flriri oljuleiðir og brunnar á norska landgrunninum.